# SAVNSFAGNAÐUR 2009

**ORKA**



## Jack Kampmann

*Jack Kampmann (1914 – 1989) var málari og grafikari og fann myndevni í m.a. landsløgum og bygdum í Føroyum. Hann málaði myndir í eini neyvt javnvigaðari samanseting við vatnrøttum, loddrøttum og diagonalum linjum, meðan sjálvt innihaldið kom í aðru røð.*

Við hesi mynd í huga kanst tú skapa tína egnu mynd, sett saman av einsøkum flatum og brotum. Hetta gert tú við at klippa puntar av gjøgnumskygdum fagurlittum pappíri, líma teir á eitt ark, og til síðst at mála ella tekna út linjur.



### 1. Savna tilfar og klipp gjøgnumskygt pappír

Legg fleiri ymisk litt pappír saman og klipp tey sundur. Tú kanst klippa fleiri í senn í einfaldum rætthyrntum formum ella tey skap, tú ynskir at brúka.



### 2. Líma formar á ark

Mála við lími ella límstift á pappírarkið. Legg síðan teir formar, tú ynskir, á pappírið, soleiðis sum tú ætlar.

Formar nær við botnin á myndini vilja tykjast nærri enn teir ovaru. Frábrigdið og umskaring vilja gagna heildini og geva myndini meira spenning og dýpd.



### 3. Smálutirnir, sum gagna heildini

Mála ella tekna linjur kring um formarar og skap. Tú kanst eisini tekna mynstur og prikkar fyri at geva myndini tað síðsta eyka, sum vil gagna heildini í myndini.

<u>Myndadømi:</u> Kamilla Ravnsfjall



## Tilfar:

lita serviett pappír
saks
límstift ella flótandi lím og pensil
dekoratiónslitir/akryllitir
og/ella krit

**LISTASAVN FØROYA**